

## Bert ein íløga ...

er í gongd í kommununi í løtuni. Tað er tann stóri og nýmótans barnagarðurin sum verður bygdur á Kambsdali. Her er talan um ein barnagarð, sum er ætlaður til 88 børn. Kostnaðurin er mettur til 25 mió krónur samanlagt.
Tað hevur tikið rættiliga drúgva tíð at fáa barnagarðin lidnan. Men ætlanin er nú, at hann skal kunna takast í nýtslu eftir summarfrítíðina í 2012.
Kommunan hevur góðar royndir við verandi barnagarði í Fuglafirði, og hetta støðið ynskir ein at halda fast við í hesum nýggja. Sagt verður, at tá komið er nakað út á árið, verða ætlandi onkrar smærri og neyðugar íløgur gjørdar ymsastaðni í kommununi.

# Hvønn morgun kl. 9

**FUGLAFJØRÐUR – Mær dámar sera væl at koma higar á bókasavnið, sigur fuglfirðingurin, Arthur Hansen, sum er ein av trúføstu gestunum á Fuglafjarðar bókasavni.
– Eg lesi bara tey føroysku bløðini, slær hann fast**

Snorri Brend

Hvønn morgun kl. 9 møtast teir á bókasavninum. Einir 10 mans at lesa føroysku bløðini og at tosa saman. Onkutíð eru teir 12 í tali.

– Tað er altíð hugaligt at lesa bløðini, sigur Arthur, sum næstu ferð fyllir 70 ár.

Hann er ein av teimum trúføstu monnunum, sum dag og dagliga vitja bókasavnið.

Fyri teimum liggja bløðini klár, og á borðinum stendur altíð ein heitur og góður kaffimunnur. Og smákøkur afturvið.

Hesin munnurin ger uttan iva sítt til, at tað gongst væl hjá heimum tilkomnu monnunum at fáa sín egna munn á glið.

– Her er gott at vera, sigur hann.

### Stýra landinum

Sum skilst, gongur prátið bæði lætt og væl, og evnini eru nógv, tá teir hittast runt runda kaffiborðið.

Ofta er politikkur á skránni, og tað er helst so sum Arthur tekur til:
– Tað var kanska hiðani, at landið átti at verðið stýrt!

Henda morgunin, ið Sosialurin vitjaði í Fuglafirði prátaðu teir heilt vist um fótbólt. Kvøldið fyri hevði ÍF nevniliga fingið javnleik ímóti EB/Streymi.

Arthur var ikki sjálvur við til »morgunfundin«, tí hann skuldi til tannlækna.

– Men nú seinnapartin, fór eg mestsum bara at vita, um ikki ein kaffimunnur kortini mundi vera eftir til mín, sigur hann við einum brosi.

Bæði Dimmalætting og Sosialurin vóru á skránni henda mikudagin í farnu viku. Serliga spennandi mundi vera hjá honum at lesa nýggja Oyggjablaðið, sum lá inni í Sosialinum.

– Ja, okkurt mugu bløðini skriva. Tað er líkamikið hvussu tey skriva – øll verða ikki nøgd kortini. Ein fær ikki øll í ein part, sigur Arthur Hansen avgjørdur.

Í dagsins blaði kann hann so, kanska á fyrsta sinni, lesa eina grein um seg sjálvan.

snorri@sosialurin.fo



**HUGNI**

*Fróðarmaðurin og 90 ára gamli Alfred Klein vitjar eisini á bókasavninum – ikki fyri at lesa, men fyri at hugna sær saman við hinum. – Vánaliga sjónin forðar mær tíverri í at lesa bløðini, sigur hann*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**» Okkurt mugu bløðini skriva. Tað er líkamikið hvussu tey skriva – øll verða ikki nøgd kortini**



**LESARI**

*– Mær dámar best at lesa tey føroysku bløðini, sigur 69 ára gamli Arthur Hansen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Trý í handlinum

**Eftir at Leirvík og Gøta løgdu saman til ta nýggju Eysturkommunu, er spurningurin, hvat Fuglafjørður ætlar, vorðin aktuellur. Býráðið tykist ikki sinnað fyri nakrari samanlegging. Men hvat siga borgararnir? Vit spurdu tríggjar fuglfirðingar, sum vóru til handils hjá Haraldsen um hetta málið. Spurningurin var: *Skal Fuglafjarðar kommuna leggjast saman við aðrar kommunu(r), ella framhaldandi verða egin kommuna?***



*– Vit liggja so nær við Eysturkommunu, og tí skulu vit sjálvandi leggja saman við teimum.*

***Margretha Rasmussen, Fuglafjørður***



*– Eg havi einki ímóti hinum kommunum, men eg haldi, at vit, sum er, klára tað fínt einsamøll.*

***Finnur Olsen, Fuglafjørður***

*– Vit skulu sjálvandi leggja saman við Eysturkommunu. Og hví ikki taka Klaksvík við eisini?*

***Dagfinnur Danbjørg, Fuglafjørður***

